## DAGSINS MEINING

# Hall - men frægari útlit

Tað vóru ikki øll, sum spáddu Norrønu tann viðvind, sum Smyril Line helst skuldi hava við tí stóru íløguni, sum varð gjørd fyri tveimum árum síðani. Hesi hava partvíst fingið rætt, tí eisini annað roknskaparárið hjá Smyril Line, eftir at Norrøna fór at pløga Atlantshav, vísir eitt hall - 24 mió.kr., sum er 11 mió.kr. minni enn árið fyri. Uttan at fara at greina støðuna, má bara staðfestast, at metingarnar, sum vórðu gjørdar, hildu ikki. M.a. er farmurin - kanska serliga tann ætlaði laksaútflutningurin úr Føroyum og Hetlandi - vorðin nógv minni enn roknað varð við. Harafturat hava inntøkurnar frá teimum ferðandi helst verið minni eisini, hóast ferðafólkatalið helst er áleið við tað, sum ætlað varð.

Alt hetta er nýggju leiðsluni greitt, og hon hevur eisini stungið ein nýggjan rakstrarpolitiikk út í kortið, sum vónandi fer at bera í sær, at ferðafólkatalið fer at økjast - at tey ferðandi fara at brúka meiri og eisini fara at fáa meiri fyri peningin, tey brúka dagarnar umborð á tí stásiliga farinum.

Tað skest ikki burtur, at skuldi tú bara keypa ferðaseðlar til eina ferð aftur og fram, og ikki júst kundi koma undir ein tilboðspakka, var ferðaseðilin rættiliga dýrur. Í øllum førum so dýrur, at hjá nógvum hevur tað loyst seg betur at fara við flogfari og leiga ein bil í eina ella tvær vikur, so tá hevur kappingarstøðan ikki verið góð. Harafturat kann spurnartekin óivað eisini setast við kostnaðarleguna á matstovunum, barrunum og í handlunum. Í øllum førum eru tað nógv, sum hava havt bæði mat og drekka við. So spurningurin er, um eitt lægri kostnaðarstig ikki hevði økt søluna umborð og ferðafólkini høvdu óivað verið meira nøgd. Her ræður um at finna ta røttu javnvágina.

Eitt annað áhugavert hjá nýggju leiðsluni er ásannanin, at nú er tað ikki skipið, sum skal fáa ferðafólk at ferðast við Norrønu, men upplivingin - at fáa hana betri. Tað skuldi óivað borið til, samstundis sum ferðafólkavinnan á Norðurhøvum, kanska serliga í Íslandi, er í stórari menning. Tann stóra inntøkan kemur kanska frá farmi, men hvørjir inntøkumøguleikar er ringt hjá leikfólki at siga, tí roknskapurin, sum varð kunngjørdur í tíðindaskrivi hóskvøldið, er ikki greinaður sundur. Neyðugt hevur verið at gera tillagingar, og hesar hava tíverri borið í sær, at fleiri starvsfólk eru sagd úr starvi.

Nú er alment sett spurnartekin við framferðarháttin, tá uppsagnirnar vórðu framdar, eins og tað er staðfest, at starvsfólkini heldur ikki vóru organiserað og komu tí ikki undir vanligar ásetingar í samband við uppsagnir - fráboðan, uppsagnartíð, arbeiðið í uppsagnartíð og onnur rættindi - sum eru í sáttmálum millum løntakarar og arbeiðsgevarar. Eitt dømi um, at leikluturin hjá fakfeløgunum er eins týdningarmikil nú sum áður. Higartil hevur tað gingið hampiligt í ár og mei mánaði setti met. Spurningurin er so, um summarsiglingin kann geva felagnum nóg stórt íkast, til at raksturin fer at bera seg sum frálíður. Tað vóna vit, tí Norrøna hevur stóran týdning fyri ferðavinnuna í Norðurhøvum, og fólkið, sum búleikast á hesum leiðum. Norrøna hevur stóran týdning fyri Føroyar sum ferðamannaland og harvið eisini fyri búskapin sum heild. Latið okkum øll hvør í sær vera við til at troyta teir møguleikar, sum Norrøna gevur okkum, alt eftir hvønn tørv hon megnar at nøkta. Hon er so ein møguleiki og eisini ein framtíðar íløga, sum treyðugt eigur at gleppa okkum øllum og Føroyum av hondum. Hon er nevniliga meira enn bara eitt ferðamannaskip. Hon er ein brúgvabyggjari við øllum tí, sum hartil hoyrir og haraftrat ein týðandi samfelagsbúskaparligur katalysatorur.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Ídnaðarkvotur

**FRÁ FELAGNUM NÓTASKIP**

Í Degi og Viku hóskvøldið var samrøða við tveir reiðarar fyri ídnaðarskip - annar fyri Havørnina og hin fyri Atlantsfarið.

Felagið Nótaskip vil loyva sær at gera hesar viðmerkingar til samrøðurnar: Hesir báðir reiðarar fingu tað til at ljóða sum um fiskimálaráðharrin bara máaði kvoturnar undan teimum og at teir ongantíð høvdu fingið nakað í staðin.

Hetta er ikki rætt. Í 1996 keypti landskassin stóran part av teimum kvotum og fiskirættindum, sum ídnaðarskipini tá høvdu. Fyri hetta og fyri at missa øll fiskirættindir á Føroya leiðini rindaði landskassin táverandi eigarum av ídnaðarskipum úti við 20 mió.kr. Hesi skip høvdu tá eingi loyvir eftir undir Føroyum - bert í Norðsjónum.

Núverandi eigarar av ídnaðarskipum hava allir keypt sær hesi avmarkaðu ídnaðarloyvir aftaná 1996 og hava tá verið væl vitandi um, hvørji avmarkaði rættindi fylgdu við skipunum. Og so eru nøkur loyvir komin afturat m.a. sildin, sum fyri okkum allar var definerað sum heystgýtandi sild, sum skuldi fiskast við nót sunnan fyri 62 stig. Um Felagið Nótaskip ikki hevði ávirkað Fiskimálaráðið til at áseta hesa seinnu kvotuna, hevði hon ikki verið til. Hon varð ongantíð ætlað øðrum enn nótaskipunum. Hon var umbiðin av nótaskipunum.

Tí skuldi hon eftir ráðum frá fiskifrøðini eisini bert fiskast við nót. Einki varð tosað um svartkjaftaloyvir til ídnaðarbátar í 1996. Hetta kom ikki upp á tal fyrrenn fiskiskapurin batnaði í 1997/98.

Skipini hjá hesum báðum nevndu reiðarum hava ikki víst tann stóra áhuga fyri at troyta tær tillutaðu kvoturnar, men hava í staðin brúkt stóra orku at útvega sær onnur fiskirættindir enn tey, teir hava í loyvunum. Og tað er væl tað, sum alt gongur út upp á: flest møgulig fiski-rættindirr.

Um lógin um vinnuligan fiskiskap og umsetiligheit skal virka, so mugu øll vera líka fyri lógini. Lógin avmarkaði í 1994 nakrar skipabólkar og so skuldi hvørt skipi sær í hvørjum bólki tillagað seg til hóskandi kvotur antin við at keypa ella selja. Hetta var andin í lógini. Og tíggjutals milliónir eru eisini brúktar í ymiskum skipabólkum til hesa tillaging.

Vit halda, at um landsstýrismaðurin gevur eftir her, so mistekur hann seg stórliga. Okkara fatan er, at dagin eftir eitt slíkt loyvi er givið, so er í hesum førinum tvey útlendsk reiðaríir, sum eru vorðin tvey sildaloyvir ríkari burtur av føroyskari kvotu og hetta má ikke henda.

Seinast vit heittu á ein landsstýrismann í fiskivinnumálum um ikki at lata nýggjar kvotur út, lurtaði hann ikki eftir okkum. Men vit fingu tíverri syrgiliga rætt í okkara ávaring. Náttina eftir tilsøgnina frá landsstýrismanninum skiftu fleiri svartkjafta- og sildaloyvir hendur og tekningarnar til nýbygningin, sum tilsøgnin varð ætlað til, vórðu brendar. Á sama hátt her. Um landsstýrimaðurin hoknar og letur loyvir burtur av, so verða tey frá útlendsku reiðaríunum boðin teimum føroysku nótabátunum til keyps og tað er ikki fyri smápening. Vit vita nakað um, hvat annað av hesum reiðaríunum ikki vil selja sína svartkjaftakvotu fyri. Teir hava sagt nei takk til fleiri milliónir.

Hvør bólkur hevur síni rættindir og hvørt skip í bólkinum sín part av teimum. At fiskivinnumyndugleikarnir flyta kvotur upp og niður og við hvørt taka tær heilt av, er ein veruleiki, sum vit øll mugu liva við - eisini okkara peningastovnar. At ídnaðarbátarnir ikki sluppu at fiska hvítingsbróður í ár, gevur teimum ikki rætt til at fáa burtur av frá øðrum skipabólkum líka so lítið sum nótaskipini kundu vænta sær burtur av frá skipunum í Barentshavinum tá íð vit mistu alla lodnukvotuna har. Teir mugu liva í vónini um at tað aftur verður loyvt at fiska hvítingsbróður kanska komandi ár.

Tað langa perspektivi í hesum kann vera áskoðanin hjá peningastovnunum. Teir hava fíggja undir ávísum fortreytum og um hesar fara at ridla, so kann ein ávís óvissa snýkja seg inn í peiningaverðina og gera tað meira trupult at útvega fígging til fiskivinnuna og fyri tann skuld aðrar vinnur.

Vit heita tí á landsstýrismannin um ikki at hokna undir hesum trýsti frá útlendingum, men at seta garð um hvønn skipabólk og virka saman við hvørjum skipabólki sær at menna og fáa sum best burturúr. Hetta halda vit vera skilagott.

*Vinarliga*
*Felagið Nótaskip*
*09.06.2005*

**Innsent tilfar**
Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

Lesið Sosialin – so eru tit við

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard
toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.